# LISTASAVN FØROYA

## Ársfrágreiðing og roknskapur
## 2003

Listasavn Føroya - Gundadalsvegi 1 - Postsmogu 1141 - FO 110 Tórshavn - Føroyar
Telefon +298 313579 - Fax + 298 316679 - T-postur: info @ art.fo - www.art.fo
Juni – 04

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ... 2
Ársfrágreiðing og roknskapur 2003 ... 3
1.0 Alment ... 3
1.1 Listasavn Føroya og framtíðin ... 3
1.2 Savnið ... 3
1.3 Skrásetingin ... 4
1.4 Varðveitsla ... 4
1.5 Gransking ... 4
1.6 Kunning ... 4
1.7 Framsýningar ... 5
1.8 Marknaðarføring ... 5
1.9 Heimasíðan ... 5
1.10 Listasavnshandilin - kaffistovan - læna høli ... 5
1.11 Trygd ... 6
1.12 Útlán / innlán ... 6
1.13 Listaverk í varðveitslu ... 6
1.14 Skjalagoymslan ... 6
1.15 Bókasavnið ... 6
1.16 Stuðul og fíggjarvánir ... 6
Virkisgrundarlag og endamál ... 7
2.1 Navnið á savninum ... 7
2.2 Adressa, telefonnummar o.t. ... 7
2.3 Savnsbygnaður ... 7
2.4 Endamálið hjá Listasavni Føroya ... 7
2.5 Samstarvsavtalur ... 7
Innsavning, keyp, gávur, kanning og gransking ... 8
3.1 Listasavnið ... 8
3.2 Keypt, givin og latin í varðveitslu ... 8
Givin: ... 8
Keyp: ... 8
Fingin í varðveitslu frá: ... 8
Savnið, goymslan og bókasavnið ... 9
4.1 Útlánt listaverk ... 9
Varðveiting og skráseting ... 11
5.1 Skráseting ... 11
5.2 Konservering ... 11
Kunning ... 12
6.1 Fasta framsýningin ... 12
Upplatingartíðir: ... 12
6.2 Skiftandi framsýningar ... 12
6.3 Vitjandi, rundvísingar og annað kunnandi virksemi ... 12
Bygnaður, leiðsla og starvsfólk ... 15
7.1 Stýrið ... 15
7.2 Leiðslan ... 15
7.3 Starvsfólk ... 15
Fulltíðarstørv ... 15
Leys hjálparfólk ... 15
8.0 Fígging og roknskapur ... 15
RAKSTRARROKNSKAPUR ... 16
FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER ... 17
NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN ... 19
Samanseting av tí almenna- og sjálvseigandi ársroknskapunum 2003 ... 20

# Ársfrágreiðing og roknskapur 2003

## 1.0 Alment

Á nýggjárinum tók nýggi savnsleiðarin Jens Fredriksen við starvi. Tíverri var Jens raktur av sjúku longu í fyrru helvt av árinum, og hann var júst farin at seta sínar ætlanir og hugskot í verk, tá ið sjúkan versnaði, og hann mátti leggja frá sær.

Savnsleiðarastarvið er áramálsett í 5 ár, og fyrsta árið er royndarár. Tað var harmiligt fyri savnið, at Jens ikki var førur fyri at halda áfram í starvinum. Vit minnast Jens við takksemi fyri ábyrgdarsemi og fyri altíð at gera sítt ítasta fyri savnið.

Sum eina fyribils loysn setti stýrið Helga Fossádal sum virkandi savnsleiðara við teirri uppgávu at gera uppskot til greiðar leiðreglur fyri arbeiðið á savninum; m.a. gera mannagongdir, roknskaparreglugerð, trygdarskipan, skráseta listaverk og aðrar fyrisitingarligar reglur, sum eru grundarlagið undir savnsarbeiðinum.
Um árslok var hetta arbeiðið komið væl áleiðis og verður væntandi liðugt á sumri 2004.

## 1.1 Listasavn Føroya og framtíðin

Fyri 11 árum síðani vóru trý starvsfólk í starvi á Listasavni Føroya (LF); stjórin, eitt savnsfólk og eitt hjálparfólk. Sammeta vit Listasavn Føroya við søvn í Danmark á somu støðd hava flestu teirra millum 8 og 15 starvsfólk.

Á LF starvast tvey starvsfólk; og stýrið hevur ásannað, at so stór arbeiðsbyrða liggur á teimum, at tey fáa ikki røkt arbeiðið til lítar. Nógv neyðugt arbeiði, sum viðtøkurnar áleggja stýrinum og leiðsluni, verður ikki gjørt, tí verandi arbeiðsorka megnar ikki alt. Tí hevur verið arbeitt við nýggjum leiðslubygnaði fyri at bøta um verandi støðu, soleiðis at savnið fær eina leiðslu við bæði einum fyrisitingarligum og einum listafrøðiligum starvsfólki.

LF er tjóðlistasavn Føroya, sum ber í sær eyka stóra ábyrgd. Savnið skal savna tað besta í føroyskari list, skráseta, varðveita, granska og kunna um hesa list. Hesar fimm uppgávurnar í savnsarbeiðinum gera LF til ein stovn, sum gevur føroyingum betri vitan og fatan av mentanararvinum, og sum úteftir gevur Føroyum eitt týdningarmikið mentanarligt andlit, og tað er tí týdningarmikið, at LF verður ment eisini sum ein fyritøka. Fyri at LF skal finna sítt rætta støði í tíðini, er neyðugt bæði at hava ein listfrøðing við royndum á listasavnsøkinum og ein fyrisitingarligan leiðara, sum er førur fyri at reka savnið sum eitt nútíðarvirki.

Tað verður hjá teimum báðum leiðarunum við starvsbyrjan at gera eina fimm ára arbeiðs- og virkisætlan og saman við stýrinum at orða ætlanir fyri tær týdningarmestu uppgávurnar. Henda arbeiðs- og virkisætlan eigur síðani á hvørjum ári um árslok at verða sett upp ímóti úrslitsuppgerðum.

Lønarútreiðslurnar hjá LF hækka við nýggju leiðsluskipanini, men egininntøkurnar hjá savninum hækka eisini. Betri møguleiki verður at søkja og fáa stuðul uttanífrá úr grunnum o.t. Møguleiki verður eisini at fáa í lag trygdarkervi og samstarv við vinnulívið og av tí stuðulsavtalur.

## 1.2 Savnið

Tjóðlistasavnið hevur skyldu at ogna sær nýggj listaverk við tí fyri eyga at víðka savnið, soleiðis at tað umboðar føroyska list.

Tað er ein fyritreyt, at LF fær eina árliga játtan, sum er markað til at keypa føroyska list fyri. Harafturat er framhaldandi neyðugt at arbeiða við at fáa stuðul úr grunnum og vinnulívinum.

Listfrøðingurin skal evna til ein keypspolitikk, sum byggir á neyva meting av listaverkum í savninum. Tá ið listaverk verða keypt, verður tað gjørt í samráð við stýrið.

## 1.3 Skrásetingin

LF hevur seinasta árið arbeitt fyri at fáa øll listaverkini, sum savnið eigur, skrásett og teldutøk. Til hetta endamálið er serstøk skipan gjørd. Leggjast kann afturat, at undir hesum arbeiði kom fram, at u.l. 75 listaverk eru ikki komin undan kavi, men hetta verður støðugt kannað. Tað er sera týdningarmikið, at hildið verður á við hesum arbeiði, og at nýkomin listaverk áhaldandi verða avmyndað og skrásett í skipanini (databasuni).

Sum frálíður er endamálið, at øll skrásett listaverk skulu leggjast út á netið. Hetta fer at menna kunnleikan um LF og føroyska list sum heild.

## 1.4 Varðveitsla

Varðveitsla er eitt høvuðsendamál hjá LF, og hon er sera týdningarmikil. Tann serkøna varðveitslan viðvíkjandi listaverkunum hjá LF tryggjar henda partin av føroyska mentanararvinum og er neyðug, so at hann ikki fer fyri skeytið.

Varðveitsla fevnir um bæði høli, har listaverkini verða varðveidd, og framhaldandi at konservera tey einstøku listaverkini.

Fleiri av týdningarmestu listaverkunum hjá LF eru í sera hættisligum (kritiskum) standi. Tað er neyðugt, tey næstu árini at nýta mikið av peningi til at konservera tey. Tað er alneyðugt, at LF hevur ein listfrøðing, sum hevur umsjón við listaverkunum, so at støðan ikki versnar við tí úrsliti, at útreiðslurnar seinni gerast munandi størri. Tá ið listaverkini verða eftirkannað javnan, er møguligt at gera eina fíggjarætlan fyri konserveringina.

## 1.5 Gransking

Sambært viðtøkunum hjá LF hevur savnið ábyrgd av, at granskað verður í føroyskari list. Sjóneyka eigur at verða sett á ávísar partar av stóra savninum hjá LF við tí fyri eyga at granskað verður á hesum økinum.

Ein bygnaður við tveimum leiðarum ger tað møguligt, at granskingarverkætlanir kunnu setast í verk, samstundis sum arbeitt verður við framsýningum, fyrireikingum og øðrum rakstri. Leiðararnir skulu javnan kunna stýrið um gongdina í granskingini og árliga lata frá sær skrivliga frágreiðing um granskingarúrslitini. Umframt hetta er møguleiki at fáa í lag samstarv við Fróðskaparsetur Føroya og aðrar lærdar háskúlar.

## 1.6 Kunning

Í komandi árum eigur kunning at verða ógvuliga høgt raðfest. LF skal miða eftir, at samband er millum kunning og aðrar uppgávur hjá savninum, gransking roknað uppí . Endamálið við framsýningum, kunningartilfari, rundvísingum, undirvísing, workshops, internet, fyrilestrum o.ø. er at geva og kunna um eina fjølbroytta og skjalprógvaða mynd av føroyskari list og listasøgu.

LF skal verða við til at menna eina ríka barnamentan í Føroyum. Í hesum sambandi at seta á stovn eina skúlatænastu og eitt lærarakervi, møguliga í samstarvi við Tórshavnar Kommunu. Møguleiki er eisini at fáa í lag samstarv við lærara- og pedagogskúlan. Umframt hetta er eitt krav til eitt nútíðar listasavn, at ein samvirkin (interaktiv) kunning verður ment á heimasíðu savnsins.

Í kunningarvirksemi hoyrir eisini annað mentanarkunnandi arbeiði. LF skal vera eitt opið og livandi stað, sum bjóðar mentanarlig tiltøk av ymiskum slagi. Hetta kann gerast við stuðli úr grunnum og samstarvi við t.d. Listafelag Føroya, sum er stuðulsfelagið hjá LF.

LF skal frameftir leggja dent á kunning og gera ein kunningarpolitikk. Tað verður ábyrgdin hjá listfrøðinginum at menna kunningarvirksemi og fáa til vega fíggjarligt grundarlag fyri hesum. Málið má verða, at vit mest møguligt fíggja alt kunningarvirksemi við grunnsstuðli. Tí er tað týdningarmikið, at listfrøðingurin hevur royndir við savnskunning og kann skapa nýhugsandi kunningartiltøk, sum stimbra savnspedagogiska gransking.

## 1.7 Framsýningar

LF skal gera savnið atkomuligt við framsýningum, sum eru grundarlagið undir kunningini. Við skiftandi framsýningum skal LF lýsa bæði tey almennu og serligu eyðkenni í føroyskari og týðandi altjóða list. Seinastu nógvu árini hevur LF havt eitt ógvuliga fjølbroytt og livandi framsýningarvirksemi. Tað eigur kortini at verða umhugsað, um fyrimunir eru í at hava færri skiftandi framsýningar og afturfyri geva teimum, sum tá vera, betri sømdir.

Til dømis kundi til hvørja framsýning verið gjørt ókeypis kunningartilfar við framsýningarteksti og yvirlit yvir listaverkini. Harumframt átti at verið bæði prentað kunningartilfar og tekstir til heimasíðuna fyri teir ymisku móttakarabólkarnar.

Langtíðarætlan eigur at verða gjørd við listasøvn í øðrum londum um sínámillum samstarv um framsýningar á altjóða stigi.

## 1.8 Marknaðarføring

Komandi árini eigur markanaðarføring at verða raðfest ovarlaga. Gerast skal ein greining viðvíkjandi marknaðarføring og langtíðarætlan fyri at menna tilboðini og tænastuna.
Frameftir verður peningaupphædd av allari fíggjarætlanini sett til viks til marknaðarføring, soleiðis at LF verður sjónligt bæði heima og í øðrum londum, og tilboðini verða kend og nýtt av eini vaksandi vitjanarfjøld.
Samstarvsavtalur kunnu gerast við t.d. ferðamannastovur.

## 1.9 Heimasíðan

Heimasíðan hjá LF hevur ein týdningarmiklan leiklut hjá savninum úteftir. Heimasíðan eigur at endurskoðast og alla tíðina at gerast meira tíðarhóskandi. Hetta er ein stór uppgáva, og tí skulu báðir leiðararnir hava royndir í arbeiðinum í kunningartøkni.

## 1.10 Listasavnshandilin - kaffistovan - læna høli

Listasavnshandilin og kaffistovan eru partur av listasavnsvitjanini, og tí eiga tey at vera ógvuliga góð. Arbeiðast skal við at gera bæði listasavnshandilin og kaffistovuna meira tíðarhóskandi, fyri at vitjandi skulu fáa góða tænastu. Listasavnshandilin og kaffistovan skulu geva inntøku, soleiðis at hesar inntøkur kunnu nýtast aðrastaðni í savnsvirkseminum; harafturat skulu tey verða við til at fáa fleiri vitjandi.

At læna høli til móttøkur, smáveitslur, mentanarlig tiltøk o.a.t eigur at verða skipað eftir føstum mannagongdum og kann gerast munandi inntøka.

## 1.11 Trygd

Arbeiðið at menna trygdarskipanirnar á LF skal raðfestast ovarlaga. Í hesum sambandi skal gerast ein trygdarfrágreiðing.

## 1.12 Útlán / innlán

LF skal eisini í framtíðini verða til reiðar at læna partar av listaverkum sínum til onnur listasøvn í samband við serframsýningar við teirri treyt, at tær vanligu trygdarskipanirnar eru í lagi , og um LF ikki hevur tørv á teimum. Tá ið listaverk verða útlænt, skulu tey kannast av konservatori, sum ger eina støðufrágreiðing. Lánarin skal gjalda útreiðslurnar av hesum.

LF hevur lænt ein hóp av listaverkum til almennar stovnar. Í farna ári er sett í gildi eitt árligt leigugjald, og í framtíðini eiga stovnarnir kanska at gjalda fyri at konservera einstøk listaverk, um tað verður hildið neyðugt.
Í sambandi við ymiskar serframsýningar er ein fyritreyt, at til ber at læna listaverk frá einstaklingum, stovnum og frá øðrum listasøvnum.

## 1.13 Listaverk í varðveitslu

Bert listaverk, sum hava áhuga hjá LF, eiga at verða tikin í varðveitslu.
LF hevur í løtuni fleiri verk í varðveitslu hjá einstøkum savnarum. Fyri hesi listaverk og listaverk, sum í framtíðini verða varðveitt á LF, skal gerast ein lánisáttmáli, sum báðir partar skulu skriva undir. Tað skal bera til at siga upp varðveitslusáttmálan við ½ árs skotbrá. LF teknar trygging fyri listaverkini í varðveitslu í varðveitslutíðarskeiðinum. LF kann nýta listaverk í varðveitslu í framsýningarhøpi.
Listaverk í varðveitslu skulu í framtíðini skrásetast í einum sjálvstøðugum parti av databasuni hjá LF

## 1.14 Skjalagoymslan

Tað verður í næsta ári arbeitt við skjalatilfarinum, sum er á savninum, so tað verður rætt skrásett, flokkað og goymt. Viðvíkjandi hesum arbeiði eigur møguleikin at fáa samstarv við Landsskjalasavnið at kannast.

## 1.15 Bókasavnið

LF eigur eitt stórt savn av listabókum, handbókum og framsýningarritum. LF hevur avtalu við Føroya Landsbókasavn, sum ger tað møguligt, at almenningurin kann læna bøkur úr savninum hjá LF.
Í framtíðini eigur at verða mett um, um LF kann hava gagn av sjálvt at umsita bókasavnið og á tann hátt draga til sín fleiri vitjandi.

## 1.16 Stuðul og fíggjarvánir

Tær serligu umstøðurnar hava gjørt, at farna árið var kostnaðarmikið. Í hesum sambandi takkar stýrið Mentamálaráðnum fyri vælvild í árinum.

Tøkk fái Jólamerkjagrunnurin og Happadráttagrunnurin fyri stuðul til eina lyftu til rørslutarnað. Hon var tøk í september 2003, og sostatt stendur rørslutarnaðum nú í boði at kunna fara um alt savnið,

Gávur frá Listafelag Føroya og Tórshavnar Kommunu hava gjørt tað møguligt at keypa u.l. 300 kvm. av veggjum til listaverkagoymslurúm okkara. Nú eru umstøðurnar hesum viðvíkjandi so góðar, sum tær eiga at vera á einum listasavni.

Nýggj uppheingingarskipan er fingin til vegar á savninum.

# Virkisgrundarlag og endamál

## 2.1 Navnið á savninum

LISTASAVN FØROYA

## 2.2 Adressa, telefonnummar o.t.

Gundadalsvegur 9, Postboks 1141, FO 110 Tórshavn
Tlf.: +298 313579. Fax: +298 316679
E-mail: info@art.fo
Heimasíða: www.art.fo

## 2.3 Savnsbygnaður

Listasavn Føroya er sjálvsognarstovnur, sum er stovnaður av Listafelagi Føroya og Føroya Listasavni í 1989, sum fevnir um framsýningarhúsið "Listaskálin", aðrar fastar ognir og savnið við føroyskari list.

## 2.4 Endamálið hjá Listasavni Føroya

- at keypa og á annan hátt fáa til vegar savn við listaverkum, undir hesum mynd- og gagnlist at skráseta og varðveita hetta savnið
- at sýna fram føroyska myndlist við fastari framsýning í Listaskálanum, og at skipa fyri skiftandi framsýningum av føroyskari og útlendskari list í Føroyum og uttanlands
- at útvega yvirlit yvir føroyska list á øðrum hondum
- at fáa til vegar bókasavn, sum lýsir føroyska list og menning hennara
- at veita skúlum, feløgum og øðrum vegleiðing og hjálp at lýsa føroyska list,
- at virka fyri, at stovnurin fjølgar um virkismøguleikarnar hjá skapandi listini.
- Listasavn Føroya kann lata almennum stovnum o.t. listaverk í varðveitslu við treytum, sum stýrið ásetur.

## 2.5 Samstarvsavtalur

Listasavnið hevur eitt sera neyvt samstarv við Listafelag Føroya, sum m.a. er stuðulsfelag hjá savninum, og sum á hvørjum ári fyrireikar ólavsøkuframsýningina. Listasavnið hevur samstarv við Føroysk Myndlistafólk, sum m.a. fyrireika ta árligu "várframsýningina".
Savnið samstarvar við Fælleskonserveringen (Vest) í Århus, tá tørvur er á konservering.
Avtalað er gjørd við Føroya Landsbókasavn um at skráseta og røkja listabókasavnið á Listasavninum.

# Innsavning, keyp, gávur, kanning og gransking

## 3.1 Listasavnið

Listasavn Føroya eigur u.l. 2000 listaverk (málningar, tekningar, vatnlitsmyndir, pastell, standmyndir, grafikk og steinprent). Hetta eru listaverk eftir føroysk listafólk ella listafólk við neyvum sambandi við Føroyar.

## 3.2 Keypt, givin og latin í varðveitslu

### Givin:

Gunnar Nikolajsen: Vitin á Borðuni (einki árstal) skrásetingarnr. 861. Olja á lørift.
Gáva frá einkini Sophie-Helene Nikolajsen(f.Restorff 13/8-1916).

### Keyp:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Tita Vinther | Pætursnótin | Gjørd av fólkahári | kr. | 30.000 |
| Bárður Jákupsson | Lindir | 100 x 135 cm | kr. | 16.000 |
| Guðrið Poulsen | Samanflættingar | Leirlist 3 stk | kr. | 20.500 |
| Amariel Norðoy | Ljósbrigdi Mikladalur | 100 x 120 cm | kr. | 18.000 |
| Amariel Norðoy | Ljósbrigdi Mikladalur | 100 x 120 cm | kr. | 18.000 |
| Hansina Iversen | Uttan heiti | 120 x 150 cm | kr. | 18.000 |
| Astri Luihn | Oceanic Vision | 60 x 75 cm | kr. | 8.500 |
| Anker Mortensen | Vangamjørki | 80 x 75 cm | kr. | 8.000 |
| Eyðun av Reyni | Logn | 140 x 165 cm | kr. | 27.000 |
| Torbjørn Olsen | Vindur | 180 x 190 cm | kr. | 45.000 |
| Jóna Rasmussen | Vatnsymfoni | 62 x 102 cm | kr. | 4.000 |
| Jóna Rasmussen | Vatnsymfoni | 62 x 102 cm | kr. | 4.000 |
| Jóna Rasmussen | Vatnsymfoni | 62 x 102 cm | kr. | 4.000 |

### Fingin í varðveitslu frá:

**Listafelag Føroya**

| | | |
|---|---|---|
| Sigrun G. Niclasen | Bókanna bók 2003 | 130 x 97 cm |
| Kári Svensson | Hugbirtingar 2003 | 200 x 260 cm |
| Astri Luihn | Birdcliffs 2003 | 120 x 100 cm |
| Hansina Iversen | Uttan heiti 2003 | 120 x 150 cm |

# Savnið, goymslan og bókasavnið

## 4.1 Útlánt listaverk

Til almennu stovnarnar, sum nevndir eru niðanfyri hava vit lænt út nøkur av okkara listaverkum:

| | |
|---|---|
| Almannaráðið | 25 |
| Arbeiðsloysisskipanina | 6 |
| Bárð Jákupsson | 1 |
| Bileftirlit Føroya | 5 |
| Danmarkar | 16 |
| Deildina fyri Arbeiðs- og Almanna Heilsu | 4 |
| Familju- og Heilsumálaráðið | 21 |
| Ferðaráð Føroya | 2 |
| Fíggjarmálaráðið | 23 |
| Fiskimálaráðið | 32 |
| Fiskiransóknarstovuna | 5 |
| Føroya Fólkaháskúla | 1 |
| Føroya Fornminnisavn | 2 |
| Føroya Gjaldstovu | 5 |
| Føroya Kærustovn | 11 |
| Føroya Landfúta | 3 |
| Føroya Landsskjalasavn | 6 |
| Føroysku Sendistovuna í Keypmannahavn | 3 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 1 |
| Gamla Apotekið / Løgtingsskrivstovuna | 8 |
| Granskingarráðið | 6 |
| Hvíldarheimið Naina | 10 |
| Landsbanki Føroya | 17 |
| Landsgrannskoðaran | 7 |
| Landssjúkrahúsið (Røntgendeildina) | 14 |
| Landsverkfrøðingin | 5 |
| Løgtingsskrivstovuna | 27 |
| Menningarstovuna | 5 |
| Mentamálaráðið | 6 |
| Oljumálaráðið | 8 |
| Postverk Føroya | 6 |
| Sjónvarp Føroya | 8 |
| Sorinskrivaran | 2 |
| Strandfaraskip Landsins | 1 |
| Studentaskúlan & HF-Skeiði í Eysturoy | 4 |
| Tinganes | 63 |
| Titu Winther | 1 |
| Tórshavnar Býráð | 1 |
| Tryggingarfelagið | 4 |
| Vinnuframagrunnin | 2 |

Til stóru Mikines-framsýningina í Danmark 2003/04 á Kastrupgårdsamlingen, Brundlund Slot og Museet for Religiøs Kunst i Lemvig hava hesi listaverk verið útlænt:

- Í Mykines bygd, regn. 1934, 57 x 65 cm
- Undirlýsi 1938,57 x 74 cm
- Fólk við havið. 1944, 89 x 96 cm
- Grindadráp 1942, 176 x 233 cm
- Morgunsól. 1946, 61 x 78 cm
- Súgur við lendingina 1952, 100 x 125 cm
- Norðan 1957, 100 x 155 cm
- Kumlagrynnan brýtur 1959, 102 x 128 cm
- Á deyðastrá 1933, 20 x 26 cm
- Mykineskona. 1934, 54 x 42 cm
- Morgun. 1939, 100 x 135 cm
- Skipini fara 1937-38, 113 x 143 cm
- Dansur 1944, 144 x 194 cm
- Kvøld í Mykinesi, 1950, 80 x 89 cm
- Postbáturin. 1955, 110 x 150 cm
- Vetrarmorgun 1958, 105 x 120 cm
- Á deyðastrá. 1933, 20 x 26 cm

# Varðveiting og skráseting

## 5.1 Skráseting

Arbeiðið at skráseta egin listaverk á teldutøk skrásetingarskipanini er byrjað og komið nakað ávegis. Fyri at fáa hetta arbeiðið avgreitt verður avgerð tikin at taka av tilboði frá Inger Smærup Sørensen, listfrøðingi, sum av stórum áhuga fyri føroyskari list hevur søkt um starv í januar 2004 uttan samsýning. Avtalað varð gjørd við Matheu Hilduberg, cand. merc. um saman við Inger at átaka sær hetta tíðarkrevjandi og týdningarmikla arbeiðið.

## 5.2 Konservering

Fælleskonservering í Århus er samstarvsfelagi okkara í konserveringsmálum.

Í ár eru eingi verk konserverað, men ætlanin fyri næsta ár er, at øll 17 Mikines-listaverkini, sum eru útlænt á framsýning í Danmark 2003/04, skulu sendast til konservering í mai 2004.

# Kunning

## 6.1 Fasta framsýningin

### Upplatingartíðir:

| **1. juni - 31. aug:** | **1. sept. - 31. mai:** | **Opið er ikki:** |
|---|---|---|
| Mánad. - fríggjad. Kl. 11-17 | Týsd. - fríggjd. Kl. 14-17 | Páskadag |
| Leygd. - sunnud. Kl. 14-18 | Leygd. - sunnud. Kl. 14-18 | Hvítusunnudag |
| | Mánadag ikki opið | Skeiðið 15/12 - 15/1 |

Savnið er opið umleið 1300 tímar árliga.

## 6.2 Skiftandi framsýningar

| | | |
|---|---|---|
| 25 jan - 16 feb | Úr Goymsluni | Verk úr goymsluni."Goymt ikki gloymt" |
| 01 - 23 mars | Várframsýningin 2003 | Føroysk Myndlistafólk |
| 5 apríl - 21 apríl | Hanni Bjartalíð & Olivur við Neyst | Nýggj verk. Olja, vatnlitir & prent |
| 26 apríl - 18 maj | Guðrið Poulsen | Leir list |
| 24 mai - 15 juni | Ymisk svensk listafólk | hjá Huddinga Konstnaraklubb |
| 21 juni - 13 juli | Janus Kamban | Afturlítandi í samb. við 90 ára føðingardegnum. standmyndir og prent |
| 28 - 31 juli | Ólavsøkuframsýningin | Listafelag Føroya |
| 9 - 31 aug. | Inn og út um gluggan | Listastevna Føroya |
| 6 - 28 sept. | Íslendskur grafikkur | 14 íslendskir grafikarar |
| 6 sept - 22 nov | Karl Isaksson | Tema úr trúgv og gudalæru |
| 4 - 26 okt. | Hansina Iversen | málningar |
| 1 - 16 nov. | Grafiski verkst. Føroya | grafikkur |
| 22 nov - 14 des | Bárður Jákupsson | málningar |

## 6.3 Vitjandi, rundvísingar og annað kunnandi virksemi

Tað hava verið 12.831 vitjandi; av hesum eru bólkar, skúlar o.t. um 3.164 vitjandi

Nógvar rundvísingar hava verið fyri felagsskapir, ferðafólkabólkar, skúlar, útlendskar gestir hjá landsstýrinum og løgtinginum og øðrum, bæði í vanligari upplatingartíð og eisini fyri og eftir vanliga upplatingartíð.

| | Vitjandi skúlar og bólkar | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 16-jan | Studentaskúlin í Hoydølum | 18 | | transportur | 908 |
| 16-jan | Nationalbankin | 5 | 25-mai | Mótaframsýning Ferðaráð | 150 |
| 20-jan | Studentaskúlin í Hoydølum | 20 | 28-mai | Venjingarskúlin | 22 |
| 22-jan | Skúli í Klaksvík | 23 | 28-mai | Hjørring Turist | 30 |
| 22-jan | Kommunuskúlin | 2 | 28-mai | Kunningarstovan | 30 |
| 28-jan | Háskúlin | 10 | 28-mai | Jørgen Astrup - Føroya Banki | 45 |
| 30-jan | Barnagarður | 7 | 28-mai | Andrias Andreassen | 30 |
| 07-feb | Studentaskúlin í Hoydølum | 20 | 14-jun | Tórshavnar Býráð | 150 |
| 11-feb | Studentaskúlin í Hoydølum | 20 | 01-jun | Norskur bólkur | 25 |
| 11-feb | Studentaskúlin í Hoydølum | 2 | 01-jun | DK bólkur | 30 |
| 15-feb | Studentaskúlin í Hoydølum | 25 | 12-jun | Kommunuskúlin | 23 |
| 18-feb | Forskúlin á Argjum | 14 | 17-jun | Ambssadørar | 60 |
| 19-feb | Studentaskúli | 15 | 18-jun | Løgum Kloster | 30 |
| 04-mar | Læraraskúlin | 10 | 19-jun | Ríkisumboðið | 55 |
| 04-mar | Háskúlin | 8 | 23-jun | Háskúlin | 8 |
| 05-mar | Læraraskúlin | 9 | 27-jun | Fólkatingsfrúur | 9 |
| 05-mar | Kollafjarðar skúli | 12 | 27-jun | Bólkur | 32 |
| 05-mar | Nólsoyar skúli | 2 | 08-jul | Tryggvi Johansen | 30 |
| 06-mar | Studentaskúlin í Hoydølum | 19 | 11-jul | Bólkur | 31 |
| 06-mar | Studentaskúlin í Hoydølum | 24 | 21-jul | BBC | 10 |
| 06-mar | Eystari landsrættur | 5 | 19-aug | Handilsskúlin | 25 |
| 06-mar | Landssjúkrahúsið | 3 | 20-aug | Handilsskúlin | 20 |
| 07-mar | Studentaskúlin í Hoydølum | 21 | 03-okt | Miðnámsskúlin á Tvøroyri | 32 |
| 07-mar | Argja skúli | 9 | 05-sep | Tekniski skúlin | 12 |
| 07-mar | Studentaskúlin á Kamsdali | 12 | 04-sep | 2 skúlar FO og DK | 44 |
| 11-mar | Studentaskúlin í Hoydølum | 21 | 04-sep | Hjørring Turist | 40 |
| 12-mar | Kommunuskúlin | 52 | 04-sep | Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 15 |
| 12-mar | Kollafjarðar skúli | 15 | 06-sep | Ensk tíðindafólk | 7 |
| 12-mar | Studentaskúlin í Hoydølum | 3 | 09-sep | Landsbankin ambassadørar | 52 |
| 12-mar | Brekkuhúsið í Klaksvík | 3 | 20-sep | Mentamálaráðið | 12 |
| 13-mar | Studentaskúlin í Hoydølum | 9 | 23-sep | ST. Frantz skúlin | 18 |
| 14-mar | Kommunuskúlin | 22 | 27-sep | Andras Olsen | 35 |
| 27-mar | Hallingdal folkeskole | 22 | 30-sep | Tekniski skúlin | 14 |
| 04-apr | Tekniski skúli | 15 | 08-okt | Studentaskúlin í Hoydølum | 16 |
| 08-apr | Kommunuskúlin | 28 | 21-okt | Kommunuskúlin | 9 |
| 23-apr | Bók Tróndar | 150 | 29-okt | Tvøroyrar skúli | 13 |
| 15-mai | Listakalendarin | 30 | 08-nov | Mentamálaráðið-Hetlendingar | 8 |
| 16-mai | Hjørring Turist | 50 | 13-nov | Klaksvíkar skúli | 32 |
| 19-mai | Føroya Bridge Samband | 70 | 25-nov | Skúlin við Norðsskála | 14 |
| 21-mai | Sharon | 35 | 25-nov | Mentamálaráðið kinesarar | 17 |
| 22-mai | Hoyvíkar skúli | 18 | 26-nov | Læraraskúli | 9 |
| 25-mai | Bólkur danskur | 50 | | | |
| | **Millum-samanteljing** | **908** | | **Tilsamans** | **2152** |

| | **Tónleikatiltøk** | |
|---|---|---|
| 06-mar | Margarinfabrikkin | 15 |
| 06-mar | Musikkskúlin | 40 |
| 23-mar | Konsert spælimenninir | 30 |
| 09-apr | Musikkskúlin | 40 |
| 10-apr | Musikkskúlin | 16 |
| 17-jun | Summartónar | 50 |
| 20-jun | Summartónar | 50 |
| 01-jul | Jazz | 50 |
| 02-jul | Jazz | 50 |
| 03-jul | Jazz | 50 |
| 04-jul | Jazz | 50 |
| 27-jul | Musik og list | 45 |
| 31-jul | Konsert Heðin Z Davidsen | 50 |
| | **Tilsamans** | **536** |

# Bygnaður, leiðsla og starvsfólk

## 7.1 Stýrið

Savnið hevur eitt stýri við 4 limum.
Mentamálaráðharrin velur ein lim, sum er formaður, og Tórshavnar Kommuna, Listafelag Føroya og Føroysk Myndlistafólk velja hvør sín lim. Fyri hvønn limin verður samstundis valdur ein tiltakslimur. Nevndin verður vald fyri eitt 4-ára skeið. Valskeiðið gongur frá 1. apríl til 31. mars eftir kommunuval. Stýrið velur varaformann. Fær formaðurin forfall, tekur varaformaðurin formanssætið.

| | |
|---|---|
| Formaður: | Gunnar Hoydal valdur av Mentamálaráðharranum |
| Nevndarlimur: | Heðin Mortensen valdur av Tórshavnar Kommunu - Bjarti Mohr varalimur. |
| Nevndarlimur: | Helgi Fossádal valdur av Listafelagi Føroya - Malan Marnersdóttir varalimur |
| Nevndarlimur: | Astri Luihn vald av Føroysk Myndlistafólk |

## 7.2 Leiðslan

Savnsleiðari Jens Damsgaard Frederiksen frá 1/1 til 31/12-03. Fráfarin vegna sjúku.
Virkandi savnsleiðari Helgi Fossádal var fyribils settur frá juni 03

## 7.3 Starvsfólk

### Fulltíðarstørv

Virkandi savnsleiðari: Helgi Fossádal
Savnshjálparfólk: Beinta Arge Gregoriussen

### Leys hjálparfólk

Eftiransingarfólk: Helga Nattestad og Sólvør Jacobsen

# 8.0 Fígging og roknskapur

Listasavn Føroya verður rikið við studningi á løgtingsfíggjarlógini, Tórshavnar Kommunu og kann eisini taka ímóti øðrum stuðli, veitingum og gávum. Harafturat kunnu takast atgongu- og leigugjøld, kantinurakstur og søla av lutum og øðrum, sum hava samband við virki savnsins.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

**Sjálvsognarparturin**

| | | 2003 | (t.kr.) *2002* |
|---|---|---|---|
| **Mentanartiltøk:** | | | |
| Atgongugjald | | 122.537 | *106* |
| Myndasøla og uppboðsøla | | 281.276 | *460* |
| Framsýningarútreiðslur | | -198.377 | *-418* |
| | | **205.436** | ***148*** |
| **Avgreiðsla, móttøka:** | | | |
| Søla ........ | | 267.611 | *223* |
| Keyp ........ | | -185.107 | *-115* |
| Goymslubroyting ........ | | -74.571 | *0* |
| | | **7.933** | ***108*** |
| **Aðrar inntøkur:** | | | |
| Stuðul ........ | 1 | 328.803 | *50* |
| Leiguinntøkur frá grafiska verkstaðnum og leiðara verkstaðarins........ | | 48.000 | *72* |
| Leiguinntøkur, grannahúsini ........ | | 98.400 | *74* |
| Leiguinntøkur, málningar o.a........ | 2 | 256.911 | *0* |
| | | **732.114** | ***196*** |
| Starvsfólkakostnaður ........ | | **-236.762** | ***0*** |
| **Úrslit av aktivitetum o.ø..** ........ | | **708.721** | ***452*** |
| **Útreiðslur:** | | | |
| Listakeyp ........ | | -221.000 | *-105* |
| Heimasíðan, skrásetingarskipanin o.a. ........ | | 0 | *-5* |
| Hald, reingerð o.a. ........ | | -11.806 | *-165* |
| Skrivstovuhald, porto o.a.. ........ | | -17.589 | *-6* |
| Bókhald ........ | | -13.000 | *0* |
| Keypt smáamboð ........ | | -1.479 | *0* |
| Ferðaútreiðslur og umboðan ........ | | -5.583 | *-39* |
| Avskriving av skuldarum ........ | | 0 | *0* |
| Annað ........ | | -15.910 | *-9* |
| | | **-286.367** | ***-329*** |
| **Úrslit fyri fíggjarligar postar** ........ | | **422.354** | ***123*** |
| Rentuútreiðslur ........ | | -265 | *-2* |
| Rentuinntøkur ........ | | 1.019 | *1* |
| | | **754** | ***-1*** |
| **Ársúrslit** ........ | | **423.108** | ***122*** |

**Stýrið mælir til, at ársúrslitið verður býtt soleiðis**:

| | | |
|---|---|---|
| At flyta til næsta ár ........ | -106.892 | *-5* |
| At flyta til Føroya Gjaldstovu ........ | 530.000 | *127* |
| | **423.108** | ***122*** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| AKTIV | | 2003 | *2002* |
|---|---|---|---|
| | | | *(t.kr.)* |
| Málningar | 3 | 15.505.100 | *0* |
| Innbúgv | | 295.354 | *296* |
| Listaskálin, 1969 | | 0 | *1.056* |
| Listaskálin, 1994 | | 18.614.366 | *17.558* |
| | | **34.414.820** | ***18.910*** |
| Bygningur, matr. nr. 1265v, Tórshavn | | **899.800** | ***900*** |
| **STØÐISOGN tilsamans** | | **35.314.620** | ***19.810*** |
| Kassapeningur | | 2.000 | *1* |
| Postgiro | | 0 | *6* |
| Føroya Banki | | 322.353 | *141* |
| Føroya Banki | | 412.140 | *430* |
| Føroya Sparikassi | | 0 | *1* |
| Føroya Sparikassi | | 0 | *5* |
| Føroya Sparikassi | | 63.451 | *36* |
| Føroya Sparikassi | | 0 | *15* |
| **Tøkur peningur tilsamans** | | **799.944** | ***635*** |
| **Goymsla** | | **241.400** | ***316*** |
| Skuldarar | | 156.369 | *50* |
| Depositum | | 224.000 | *0* |
| Tíðaravmarkingar | | 0 | *18* |
| MVG | | 5.958 | *0* |
| **Áogn tilsamans** | | **386.327** | ***68*** |
| **OGN Í UMFERÐ tilsamans** | | **1.427.671** | ***1019*** |
| **AKTIV tilsamans** | | **36.742.291** | ***20.829*** |

**Veðseting:**

Matr. nr. 1265v, Tórshavn:

| | |
|---|---|
| Føroya Sparikassi | 641.978 |
| Føroya Sparikassi | 800.000 |
| | **1.441.978** |

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| PASSIV | Nota | 2003 | (t.kr.) *2002* |
|---|---|---|---|
| Saldo primo ...................................................................... | | 19.719.166 | *19.620* |
| Listaverk sambært uppgerð............................................... | | 15.284.100 | *0* |
| Keyp av listaverkum í árinum ............................................ | | 221.000 | *0* |
| Føroya Gjaldstova, avdráttir ............................................. | | 140.613 | *105* |
| Flutt frá rakstri .................................................................. | | -106.892 | *-5* |
| **Eginogn ultimo** ................................................................ | | **35.257.987** | ***19.720*** |
| | | | |
| **Lán viðv. matr. Nr. 1265v í Tórshavn:** | | | |
| Føroya Sparikassi 267.584.8 | | 252.230 | *335* |
| Føroya Sparikassi 281.933.5 | | 559.803 | *618* |
| **Lán tilsamans** | | **812.033** | ***953*** |
| | | | |
| Føroya Gjaldstova (ársúrslit) | 4 | 530.000 | *127* |
| Ognarar | | 129.140 | *26* |
| Skyldugt mvg | | 0 | *3* |
| Giro | | 801 | *0* |
| Onnur skuld | | 12.330 | *0* |
| **Skuld tilsamans** | | **672.271** | ***156*** |
| | | | |
| **PASSIV tilsamans** | | **36.742.291** | ***20.829*** |

## NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | | 2003 | *(t.kr.)* *2002* |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Stuðul** | | |
| | Føroya Landsstýri Varðveita mentanararvi ........................ | 60.000 | *50* |
| | Tórshavnar býráð ............................................................ | 75.000 | *0* |
| | Jólamerkjagrunnurin ........................................................ | 44.803 | *0* |
| | Listafelag Føroya ............................................................ | 54.000 | *0* |
| | Happadráttargrunnurin ..................................................... | 90.000 | *0* |
| | Dansk – Færøsk Kulturfond ............................................. | 5.000 | *0* |
| | **Saldo ultimo** .................................................................... | **328.803** | ***50*** |
| **2.** | **Leiguinntøkur málningar o.a.** | | |
| | Leiga Skálan til tiltøk ........................................................ | 18.425 | *0* |
| | Leiga til móttøkur o.l. ....................................................... | 5.156 | *0* |
| | Leiga – List og málningar ................................................. | 233.330 | *0* |
| | **Saldo ultimo** .................................................................... | **256.911** | ***0*** |
| **3.** | **Málningar** | | |
| | Saldo primo ...................................................................... | 0 | *0* |
| | Listaverk smb. uppgerð .................................................... | 15.284.100 | *0* |
| | Keypt í árinum .................................................................. | 221.000 | *0* |
| | **Saldo ultimo** .................................................................... | **15.505.100** | ***0*** |

**<u>Keypt í árinum:</u>**

| **Listafólk:** | **Heiti:** | **Prísur:** |
|---|---|---|
| Bárður Jákupsson | Lindir | 16.000 |
| Guðrið Poulsen | Samanflættingar | 20.500 |
| Amariel Norðoy | Ljósbrigdi, Mikladalur | 36.000 |
| Hansina Iversen | Uttan heiti | 18.000 |
| Astri Luihn | Oceanic Vision | 8.500 |
| Anker Mortensen | Vangamjørki | 8.000 |
| Eyðun av Reyni | Logn | 27.000 |
| Torbjørn Olsen | Vindur | 45.000 |
| Jóna Rasmussen | Vatnsymfoni | 12.000 |
| Tita Vinther | Pætursnótin | 30.000 |
| Gunnar Nicolajsen (gáva frá arvingunum) | Vitin á Borðini | 0 |
| **Tilsamans** | | **221.000** |

| | | 2003 | *2002* |
|---|---|---|---|
| **4.** | **Føroya Gjaldstova** | | |
| | Saldo primo ...................................................................... | 126.800 | *182* |
| | Flutt úrslit ......................................................................... | 530.000 | *127* |
| | Goldið í árinum ................................................................. | -126.800 | *-182* |
| | **Saldo ultimo** .................................................................... | **530.000** | ***127*** |

## Samanseting av tí almenna- og sjálvseigandi ársroknskapunum 2003

| | Sjálvseigandi | Almennur | Samlað |
|---|---|---|---|
| **Mentanartiltøk:** | | | |
| Atgongugjald | 122.537 | 0 | 122.537 |
| Myndasøla | 281.276 | 0 | 281.276 |
| Framsýningarútreiðslur | -186.137 | -143.811 | -329.947 |
| | **217.677** | **-143.811** | **73.866** |
| **Avgreiðsla, móttøka:** | | | |
| Søla | 267.611 | 0 | 267.611 |
| Keyp | -185.107 | 0 | -185.107 |
| Goymslubroyting | -74.571 | 0 | -74.571 |
| | **7.933** | **0** | **7.933** |
| **Grafiskur verkstaður:** | | | |
| Leiguinntøkur grafiskur verkstaður | 48.000 | 0 | 48.000 |
| Útreiðslur grafiskur verkstaður | -12.240 | -21.010 | -33.250 |
| | **35.760** | **-21.010** | **14.750** |
| **Úrslit av aktivitetum o.a.** | **261.370** | **-164.820** | **96.549** |
| **Aðrar inntøkur:** | | | |
| Stuðul | 328.803 | 2.243.264 | 2.572.067 |
| Leiguinntøkur grannahúsini | 98.400 | 0 | 98.400 |
| Leiguinntøkur list | 233.330 | 0 | 233.330 |
| Leiga til reseptiónir | 5.156 | 0 | 5.156 |
| Leiga Skálan út til tiltøk | 18.425 | 0 | 18.425 |
| | **684.114** | **2.243.264** | **2.927.378** |
| **Fyrisitingarútreiðslur:** | | | |
| Fastlønt | -235.000 | -702.750 | -937.750 |
| Tímalønt | 0 | -209.226 | -209.226 |
| Samsýningar, viðbøtur og arb.gjøld o.a. | -1.762 | -190.664 | -192.426 |
| El-útreiðslur | 0 | -108.452 | -108.452 |
| Hitaútreiðslur | 0 | -91.440 | -91.440 |
| Olja til maskinur o.a. | 0 | -15.408 | -15.408 |
| Telefon | -480 | -22.276 | -22.756 |
| Edv o.a. | 0 | -56.351 | -56.351 |
| Roknskaparhjálp og grannskoðan | -13.000 | -44.500 | -57.500 |
| Trygging | 0 | -57.343 | -57.343 |
| Vaktartænasta | 0 | -26.927 | -26.927 |
| Hald, reingerð o.a. | -11.806 | -157.507 | -169.313 |
| Skrivstovuhald, porto o.a. | -17.109 | -73.103 | -90.212 |
| Keypt smáamboð | -1.479 | -28.365 | -29.844 |
| Ferðaútreiðslur og umboðan | -5.583 | -44.146 | -49.729 |
| Flutningsútbúnaður | -1.454 | -108.909 | -110.363 |
| Annað | 1.436 | -225.605 | -224.169 |
| | **-286.237** | **-2.162.972** | **-2.449.209** |
| **Aðrar útreiðslur:** | | | |
| Listakeyp, konservering o.a. | -221.000 | -203.402 | -424.402 |
| Bøkur, tíðarrit o.a. | 0 | -43.170 | -43.170 |
| Óvanligar útreiðslur | -15.892 | 0 | -15.892 |
| | **-236.892** | **-246.572** | **-483.464** |

Framhald á næstu síðu!

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Úrslit fyri fíggjarligar postar** | **422.354** | **-331.100** | **91.254** |
| Fíggjarligar inntøkur | 1.019 | 0 | 1.019 |
| Fíggjarligar útreiðslur | -265 | 0 | -265 |
| | **754** | **0** | **754** |
| **Úrslit** | **423.108** | **-331.100** | **92.008** |
| Partur av úrsliti flutt frá sjálvseigandi til almenna uppgerð | -530.000 | 530.000 | |
| Lánsgjøld | 0 | -198.900 | |
| | -106.892 | 0 | |

Uppskot til ársfrágreiðingina er løgd fyri stýrið á Listasavni Føroya

Tórshavn, 22. 6. 2004

**Helgi Fossádal**